# Ferðsluvanlukka kravdi mannalív

**Ein ferðsluvanlukka hevur aftur kravt eitt ungt lív. Ein bilur fór av vegnum við Áir sunnumorgunin, og ein 19 ára gamal drongur lat lív**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Seks mans í aldrinum 19 til 34 ár vóru við í bilinum. Løgreglan fekk fráboðanina beint eftir klokkan seks sunnumorgunin og staðfesti, at tann eini, ein 19 ára gamal drongur, sum hevði fylt 20 ár mánadagin, var deyður á staðnum. Hinir fimm vórðu allir fluttir á Landssjúkrahúsið. Vakthavandi sigur, at løgreglan hevur fingið at vita, teir hava tað allir eftir umstøðunum gott. Onkur hevur brotið arm ella kjálkabein, men tað stendur ikki um lív hjá nøkrum teirra.

Løgreglan veit ikki, hvat orsøkin til vanlukkuna var, men tað er onki, sum týðir upp á, at rúsdrekka er orsøkin.

– Tað mest sannlíka er, at bilførarin er sovnaður, sigur vakthavandi.

Bilurin fór niðan av vegnum, og kanningar hjá løgregluni vísa, at hann fór umleið 135 metrar gjøgnum hagan.

Øll tey avvarðandi hava fingið bjóðað kreppuhjálp.

# Koyrdu ávirkaðir

**Tveir bilførarar vórðu tiknir fyri at koyra ov skjótt í Havn og ávirkaðir av rúsdrekka**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Í tveimum førum eru bilførarar tiknir fyri at koyra ávirkaðir og ov skjótt í Havn í vikuskiftinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í tveimum førum vórðu bilførarar tikinir fyri at hava ov nógva ferð og verða ávirkaðir av rúsdrekka.

Tann eini bilførarin varð tikin uppi á Marknagilsvegnum, har hann koyrdi 99 í bygdum øki. So hann kann verða vísur í at missa koyrikortið. Harafturat var bilførarin heldur ikki edrúur – og so langt ífrá.

Vakthavandi á løgreglustøðini sigur, at maðurin hevði 1,4 ‰ í blóðinum, tá hann blásti.

– So hesin kemur at missa koyrikortið, sigur vakthavandi.

Í hinum førinum var talan um ein stolnan bil í fyrstu atløgu.

Løgreglan fekk fráboðan um ein stolnan bil sunnunáttina, men tað gekk bert ein lítil løta, so var boðað frá, at bilurin var komin aftur íaftur.

Men ein lítlan tíma seinni var sami bilur í einum óhappi beint við Kaldbaksvegin. Bilurin var farin útav beint áðrenn vegin inn til Kaldbaks og lá í veitini har. Bilførarin hevði 1,48 ‰ í blóðinum.

– Viðkomandi koyrir ávirkaður og við ongum koyrikorti, so hann kann vænta sær eina heilsan frá fútanum, sigur vakthavandi.

Tey, ið varða av bilinum, hava fingið áheitan um at fáa bilin fluttan.

Leygardagin beint fyri nátturðatíð hendi eitt ferðsluóhapp úti á Homrum á Argjum. Ein níggju ára gomul genta á súkklu endaði undir einum bili. Tíbetur hendi onki álvarsamt við henni. Hon fekk nakrar smávegis snuddir, men hevur tað gott.

# Berit í Leikalund



*Berit Norðoy hevur málningaframsýning í Leikalund í Klaksvík hendan mánaðin*

**Í september hevur Berit Norðoy málningaframsýning í Leikalund**

LISTAFRAMSÝNING
*Solby A .Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Málningarnir hjá Berit, sum eru 13 í tali, eru allir akrylmálningar. Talan er fyri tað mesta um landsløg og aktivitet millum fólk.

– Onkrir eru abstraktir, men tað mesta er tó ikki abstrakt, sigur Berit, sum altíð hevur dámt væl at teknað og málað.

Hon hevur gingið á kvøldskúla og málað í eini fimm ár, og tað dámar henni sera væl, tí har fær hon betur stundir til at røkja sítt ítriv.

Leikalund er ein fløgu og bókahandil fyri tað mesta. Men í eina tíð nú hava tey somuleiðis virkað sum eitt slag av einum listaskála, har fleiri listafólk hava sýnt teirra verk fram. Tað er ongin listaskáli í Klaksvík, so listarfólk eru fegin um hendan møguleikan til at hava framsýningar. Og hendan mánaðin er tað so sum sagt, Berit Norðoya, sum hevur framsýning.

Berit, sum er 25 ár, arbeiðir til dagligt sum bankakvinna í Føroya Banka, og hon leggur dent á, at málingin er hennara ítriv.

# Vietnam: Talið av avrættingum veksur

**Talið av avrættingum og deyðadómum veksur ógvusligt í Vietnam. Bara í ár eru 19 fólk avrættað og 62 eru dømd til deyða. Tað er meira enn tvífalt samanborið við sama tíðarskeið í fjør**

**Tíðindaskriv**

Hetta stendur klárt og týðiligt í frásøgnini »Vietnam - The death penalty - inhuman and ineffective«, ið varð kunngjørd fyri stuttum.

Tølini eru grundað á almennar upplýsingar og Amnesty metir, at veruligu tølini eru nógv hægri.

Avrættingarnar vera framdar framman fyri einari avrættingarpatrulju, ið telur fimm fólk, tær vera ofta framdar alment. Líkið verður grivið beinanvegin og tey avvarðandi verða ikki kunnað áðrenn. Tey verða nakrar dagar seinni biðin um at koma eftir tingunum hjá tí avrættaða.

27 lógarbrot verða revsað við deyðarevsing í Vietnam, har ímillum rán og fíggjarsvik. Ein triðingur hava samband við rúsevnalógarbrot.

- Vit eru eisini sera bangin fyri, at rættarmálini ofta ikki liva upp til altjóða normar fyri, hvussu eitt rættarmál skal avgreiðast. Hetta kann føra til, at ósek vera dømd, sigur Amnesty í frásøgnini.

Amnesty metir, at deyðarevsing skúgvar til viks tann mest grundleggjandi rættin, rættin til lív. Tað finnast heldur ikki nøkur prógv fyri, at deyðarevsing virkar ræðandi, heldur tvørtur ímóti hevur tað víst seg, at vandin fyri vápnaðari mótstøðu í samband við handtøkur økist.

Amnesty mælir vietnamesisku myndugleikunum til at minka um talið av lógarbrotum, ið verða revsað við deyðarevsing og seinni at avtaka deyðarevsing. Í frágreiðingini eru eisini fleiri onnur tilmælir til myndugleikarnar.

### Nigeria: Lagnan hjá Aminu útsett

Um kvøldið 27. august útsetti hægri rætturin í statinum Katsina, fyri triðju ferð sakina hjá Aminu Lawal. Hon varð útsett til 25. september.

- Hetta er sera óheppið. Hetta økir um ófriðin og óvissuna hjá Aminu og soni hennara, og ger at tey ikki kunnu liva eitt vanligt lív.

Amina Lawal og hennara sakførarar vóru tilstaðar í rættarsalinum. Tað er enn ikki kent, hví dómstólurin valdi at útseta sakina hjá Aminu.

Amina Lawal varð dømd at verða steina til deyðis fyri hjúnabandsbrot av shariadómstólinum í Katsina norðarlaga í Nigeria í mars 2002. Hon kærdi dómin til tann hægsta shariadómstólin í statinum og bíðar nú eftir, at dómstólurin skal avgera sakina.

Hundraðtals menniskju kring heimin hava arbeitt fyri lívinum hjá Aminu. Amnesty hevur fleiri ferðir funnist at, hvussu sharialóginar verða tulkaðar norðarlaga í Nigeria, millum annað fyri at gera mismun og loyva dómum sum steining, písking og amputatión. Tulkingin má vera broytt, so at ikki fleiri onnur koma í somu støðu sum Amina.



Hans Mortensen seksti í dag, og still going strong:

# Venur fast tríggjar ferðir um vikuna

**Ein kann ikki siga at stjórin í SMS, Hans Mortensen, liggur á latu síðuni. Umframt eitt strævið stjórastarv, so setur hann nógva tíð av til venjing um vikuna. – Eg haldi, tað er ómetaliga týdningarmikið í einum starvi, sum er hart og fer við nógvari tíð, at ein er í góðari fysiskari venjing, sigur føðingardagsbarnið, ið rundar tey 60 í dag.**

60-ÁRA FØÐINGARDAGUR
*Páll Holm Johannesen*



*Hóast Hans Mortensen í dag verður seksti, so hevur ongar ætlanir um gevast við venjingini. Tíðina, eg brúki til at venja, fái eg aftur flerifalda, tí eg verði nógv betri fyri av tí, greiðir Hans frá*

Í dag fyllir ein av royndastu vinnulívsmonnum í Føroyum, Hans Mortensen, seksti. Síðan 1977 hevur hann havt ta stóru uppgávu at stjórna landsins størstu sølumiðstøð. Tey góðu 26 árini við róðrið á SMS hava bæði rúmað gleðiligar og minni gleðiligar løtur. Hvussu støðan hevur verið og ikki í SMS, so hevur stjórin kortini hildið fast um ein vana. Hann hevur seinastu mongu árini vant fast tríggjar ferðir um vikuna.

Venjingin er soleiðis løgd til rættis, at ein tími er settur av týsdag, hósdag og leygardag til venjing. Týsdagar og hósdagar er mýking og súkkling á skránni, meðan Hans Mortensen "Powerwalkar" leygardag. Powerwalking er ein samantvinning av gongd og renning.

Venjingarnar týsdag og hósdag liggja fast klokkan 10 um morgunin, og stjórin plagar at vera burtur frá arbeiðsplássinum í ein góðan tíma. Venjingin gongur fyri seg heima við hús, har hann hevur riggað eitt kamar til í kjallaranum. Fyri at stytta um venjingartíðina, so hevur Hans sum vana, at hann lurtar eftir útvarpinum hjá BBC, tá dýkir á við venjingini.

Starvsfólkini í SMS vita fullvæl, at stjórin er burtur ein tíma hvønn týsdag og hósdag. Hesum verður eisini tikið fyrilit fyri, og ongar avtalur verða gjørdar við stjóran týsdag og hósdag millum klokkan 10 og 11.

Tað er ikki av tilvild, at venjingarætlanin hjá Hans Mortensen er júst løgd týsdag, hósdag og leygardag. Henda venjingarætlan gevur stjóranum í SMS møguleika at binda fri dagin eftir venjing, so hann klárur at herja á aftur.

Hóast venjingarætlanin kann tykjast møtumikil hjá flestu okkara, so hevur Hans Mortensen, hóast hann nú rundar tey trýss árini, ongar ætlanir um at gevast. Ætlanin er at halda á, so leingi orkan er til tess, og sambært honum sjálvum, so er einki til hindurs fyri, at hildið verður fram við venjingini nøkur ár afturat.

### Virkin hondbóltsspælari

Hans Mortensen íðkaði nógvan ítrótt sum yngri. Hann spældi hondbólt við Neistanum í Havn, og tevið fyri at stjórna fekk hann longu sum 18 ára gamal, tá hann gjørdist formaður í felagnum.

Stjórin í SMS nevnir fyri okkum, at hann millum annað var við til at byggja Neistahúsið í Gundadali, har ÍSF í dag húsast. Umframt at taka sær av tí fyrisitingarliga í felagnum, so var hann eisini virkin á hondbóltssvøllinum.

Hann var fastur fúsur á 1.liðnum hjá Neistanum í 60 árunum og fram til fyrst í 70 árunum. Ein skaði hevði við sær, at hann varð noyddur at seta hondbóltsskógvarnar á hillina, áðrenn ætlað. Í dysti fyri Neistan ímóti einum donskum liði, fór økslin hjá Hans úr lið, og hann kom aldrin fyri seg aftur. Seinnu árini fram til miðskeiðis í áttati árunum spældi hann nakað av motiónshondbólti, til hann endaliga legði skógvarnar á hillina.

Umframt at verða neistamaður um ein háls, so royndi Hans Mortensen seg bæði sum leikara og venjara á føroyska hondbóltslandsliðnum.

Hann stóð á odda fyri føroyska hondbóltslandsliðnum til C-HM í Portugal, tá føroyska hondbóltslandsliðið fekk nøkur frálík úrslit. Úrslitini í Portugal í 1976 standa framvegis sum tey bestu, nakað føroyskt lið hevur avrikað í altjóða høpi.

### Sama venjingarætlan øll árini

Tað kann tykjast rættiliga møtumikið hjá einum 60 ára gomlum manni, ið skuldi havt ivaleyst við at røkja eitt strævið stjórastarv, at venja so nógv, sum Hans ger, men hesum vísir hann aftur. Hann sigur, at tá, ein hevur íðkað so nógvan ítrótt, sum hann hevur gjørt øll ungdómsárini, er tað natúrligt, at ein heldur á við tí, eftir ein givin sum virkin ítróttamaður.

– Eg haldi, tað er ómetaliga týdningarmikið í einum starvi, sum er hart og fer við nógvari tíð, at ein er í góðari fysiskari venjing, sigur Hans Mortensen.

Spurdur, um hann metir, at sínir samstarvsfelagir áttu at gjørt tað sama, svarar Hans, at hann er ikki greiðir yvir, hvør íðkar og ikki, men hann vil ráða øllum til at motionera, tí tað lættir um trýstið á arbeiðinum.

– Tíðina, eg brúki til at venja, fái eg flerifalda aftur, tí eg verðið nógv betri fyri av tí, greiðir hann frá.

Merkisvert er, at venjingarætlanin hjá Hans hevur verið tann sama øll árini

Hvørja ferð ger hann ymiskar mýkingar í góðar 15-20 minuttir, og súkklar í ein hálvan tíma. Tað kundi verið natúrligt at vant minni, nú hann eldist, men tað vil Hans Mortensen ikki hoyra nakað um. Eftir hansara tykki, hevði tað verið eitt niðurlag í sær sjálvum, um hann nú minkaði venjingina

Stjórin í SMS heldur, at vinnulív og ítróttaheimurin minna ikki sørt um hvønn annan. – Betri tú ert fyri fysiskt, betur megnar tú at standa ímóti, tá á stendur. Í vinnulívinum er eisini talan um eitt lið, sum ein skal fáa at spæla saman, og sum í ítróttinum, so skalt tú eisini gera alt fyri at vinna, greiðir Hans Mortensen frá.

### Umvælingin fáast frá hondini

Hans Mortensen ásannar, at hann hevur gjørt sær nakrar hugsanir um, hvat hann skal fyritaka sær í framtíðini. Tað er fastlagt, at hann verður stjóri í SMS til umfatandi umvælingararbeiðið við sølumiðstøðuni er fingið frá hondini.

Fyrsta byggistig í norðara enda er gjørt, og eftir bíðar restina av bygninginum. Eftir ætlan skuldi restin av umvælingin gerast í 2005, men umbyggingin er nú útsett til árið eftir. Talan er um eina rættiliga umfatandi umbygging, sum fer at geva SMS fullkomiliga nýggjan ham.

Umbyggingina sær Hans Mortensen sum sína høvuðsuppgávu, áðrenn hann letur stjórastarvið, sum hann hevur røkt øll árini, frá sær.

### Royndirnar hjálpa væl

Spurdur, um tað er øðrvísi at vera stjóri, tá ein var 40 ár, og nú hann rundar tey trýss, svarar Hans Mortensen, at serliga koma royndirnar einum væl við. – Eg havi gjørt onkrar stórar brølarar í 80 árunum, sum eg eri noyddur at taka á meg, men royndirnar gera nú, at eg ikki geri somu mistøk aftur, sigur Hans Mortensen.

Í dag fara tey nærmastu hjá Hans at hátíðarhalda 60-ára føðingardagin, meðan stóra ballið verður leygarkvøldið á Hotel Føroyum. Hann fortelur, at hann hevur ikki hildið nakran føðingardag, síðan hann var fjøruti, og tískil skyldaði hann nærmast at halda føðingardag hesaferð. Góð 150 fólk eru bjóðað í føðingardag leygarkvøldið.